TILFEINGIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 27. februar 2025
J.nr. 26/04689

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Svar frá Eiriki í Jákupsstovu, landsstýrismanni, upp á § 52a-fyrispurning nr. 52-097/2025 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, um nýggjan vinnupolitikk

Spurningar vóru soljóðandi:

1. Hvat er støðan við arbeiðinum við nýggja vinnupolitikkinum, og nær verður tað liðugt?
2. Er ætlanin, at viðurskiftini hjá íverksetarum og nýskapanarfyritøkum verða ein partur av vinnupolitikkinum?
3. Hvørjir ítøkiligir batar eru ávegis fyri føroyskar íverksetarafyritøkur, sum landsstýrismaðurin ætlar at seta í verk?

Svarað verður undir einum:
Farið var undir at skipa arbeiðið við nýggja vinnupolitikkinum og at savna neyðuga tilfarið. Síðani verandi vinnupolitikkur varð gjørdur, er nógv gjørt fyri at gera og dagføra vinnugreinapolitikkir og fremja hesar við lógarverki og øðrum neyðugum karmum.

Tá ið ein nýggjur samlaður vinnupolitikkur skal gerast, verður í stóran mun talan um at lýsa tey heilt yvirskipaðu vinnupolitisku prinsippini, sum eisini eru grundarlagið undir øllum vinnugreinapolitikkum, og harnæst karmarnar, sum hava ávirkan á allar vinnur, t.d. lóggávu um vinnuskatt, arbeiðsmarknað, útlendska arbeiðsmegi, felags tøk at fáa útisetar heim o.a.

Í sambandi við, at løgtingsvalið er útskrivað, hevur løgmaður heitt á landsstýrisfólkini um ikki at gera annað enn tað, sum er alneyðugt til tess at fyrisitingin kann halda fram ótarnað. Tískil verður ikki mett rætt at svara spurningunum um, hvørjar politiskar ætlanir landsstýrismaðurin hevur fyri íverksetarar og nýskapandi fyritøkur.

Tilfeingis- og vinnumálaráðið, 27. februar 2026

Eirikur í Jákupsstovu
landsstýrismaður